# Í fótafetum

**Jón á Steig, leiðandi yvirlækni, hevur starvast á Landssjúkrahúsinum í meiri enn ein mansaldur. Synir hansara Bjarni og Torkil eru eisini yvirlæknar og starvast nú á Landssjúkrahúsinum. Báðir royndu teir at stýra uttanum læknayrki, men endaðu kortini við at ganga fótafet faðirsins. – Tað einasta, ið hevur verið fastur partur av okkara uppvøkstri, er sjúkrahúsumhvørvið, siga brøðurnir báðir**



*– Hetta kunnu vit brúka sum jólakort, segði Jón á Steig skemtandi, tá Jens Kristian Vang, myndamaður, hevði tikið myndina av teimum trimum*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

## Samrøða



**Rólant Waag Dam**
blaðmaður
rolant@sosialurin.fo

Alt ov fáir serlæknar eru í Føroyum. Tað er ein sannroynd, vit bara kunnu staðfesta. Men av teimum fáu serlæknunum, vit hava her heima, eita tríggir teirra á Steig til eftirnavn. Tað eru feðgarnir Jón, Bjarni og Torkil.

Jón á Steig hevur verið yvirlækni á Landssjúkrahúsinum í meiri enn ein mansaldur, og frá ársbyrjan í ár vórðu synir hansara, Bjarni og Torkil, settir í starv sum yvirlæknar har.

At teir hava ovmikið at takast til og eru upptiknir upp um bæði oyru, kunnu greinaskrivari og myndamaðurin vátta. Eftir ótaldar telefonsamrøður eydnaðist tað loksins at finna eina løtu, har teir tríggir saman kundu seta seg at greiða frá, hvussu tað bar til, at allir tríggir eru endaðir sum yvirlæknar á Landssjúkrahúsinum.

### Uppvaksnir í sjúkrahúsumhvørvinum

Jón á Steig gjørdist lækni í 1968, og hava hann og familjan flutt nógv gjøgnum ár og dag.

– Tað einasta, sum altíð hevur verið fast, er, at vit hava verið partur av sjúkrahúsumhvørvinum. Vit eru uppvaksnir í umhvørvinum har, leggur Bjarni á Steig fyri við at siga.

– Tey flestu halda tað vera fremmant at vera á sjúkrahúsi, men ikki vit. Vit hava enntá hildið jól har, greiðir Bjarni á Steig frá og smílist.

Hevur sjúkrahúsumhvørvið fylt nógv í uppvøkstrinum hjá brøðrunum á Steig, so fyllir tað uppaftur meiri í dag, nú teir báðir – eins og pápin – eru yvirlæknar.

– Landssjúkrahúsið fyllir alt ov nógv við døgurðaborðið, og hevði tað ikki verið fyri svágin, so var tað bara sjúkrahúsprát, flennir Torkil á Steig.

Bjarni nikkar samtykkjandi, men leggur so aftrat tí beiggin hevur sagt, at tagnarskylda er nakað, sum tey ganga høgt upp í á sjúkrahúsinum, og hetta verður sjálvandi eisini virt heima við hús.

### Konurnar eisini í fakinum

Í mun til svágin hjá brøðrunum báðum, so er hann tann einasti í nærmastu familjuni, sum so ella so ikki er knýttur at sjúkrahúsverkinum. Systur Bjarna og Torkil er sjúkrasystur. Kona Jón var skrivari á Landssjúkrahúsinum í ein mansaldur. Kona Bjarna er jarðarmóðir og kona Torkil er fysioterapeut.

– At øll eru í økinum ger, at vit hava eitt stórt forstáilsi fyri hvørjum øðrum, heldur Bjarni á Steig.

### Royndu aðrar vegir

– Í læknafamiljum er tað antin ella. Annaðhvørt verður tú lækni ella okkurt heilt annað, sigur Torkil. Hetta hevur hann sjálvur